# Fólkatingsumboðini rúkandi ósamd

**Føroysku umboðini á Fólkatingi eru rúkandi ósamd um støðuna hjá Føroyum í málinum um yvirtøku- og heimildarlógina**

FÓLKATINGIÐ
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*




*Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal stóðu einaferð lið við lið mótvegis donsku stjórnini, men nú eru teir rúkandi ósamdir um støðu Føroya í sambandi við yvirtøku- og heimildarlógirnar, ið verða viðgjørdar fyri seinastu ferð á Fólkatingi fríggjadagin*

Einaferð stóðu teir saman sum ein maður mótvegis donsku stjórnini. Nú standa teir hvør sínu megin røðarapallin í Fólkatinginum, og neistarnir fúka, nú Fólkatingið viðgerð yvirtøku- og heimildarlógina. Vit kunnu sostatt staðfesta, at tey føroysku ikki standa saman um støðu Føroya í hesum máli.

### Genialur hjálandapolitikkur

Høgni Hoydal fer enn einaferð at føra tey somu sjónarmiðini fram í dag.

– Eg fari enn einaferð at vísa á tann sjónleik, sum fer fram í hesum málinum. Hetta verður sett fram sum eitt nýskipanarmál, ið fer at geva okkum víðariræsur, men tað einasta, sum hendir, er, at danskt vald verður staðfest í Føroyum, sigur Høgni Hoydal undan 3. viðger.

Høgni Hoydal vísir á tað paradoksala í, at tað danska Fólkatingið er munandi meira kritiskt mótvegis hesi lógini enn Løgtingið.

Hann sipar til støðuna hjá tí danska málinum í ríkinum, har teir donsku fólkatingslimirnir vóru skeptiskir mótvegis støðuni hjá danska forsætisráðharranum, sum knýtti tað danska málið uppí ríkiseindina.

Eitt annað kjakevni í Fólkatinginum var viðvíkjandi felagsskapinum NAMMCO, ið er ein alternativur felagsskapur til altjóða hvalaveiðunevndina (IWC). Í hesum felagsskapi hava Føroyar og Grønland sjálvstøðugan limaskap saman við Íslandi og Noregi.

– Hetta eru rættindi, ið vit hava vunnið, men sum vit nú lata frá okkum, sigur Høgni Hoydal, ið leggur afturat, at hetta er væl klárað av donsku stjórnini, men ein skomm fyri løgtingið og løgmann.

– Tað er sera harmiligt, at Anfinn Kallsberg stuðlar tí donsku stjórnini í hennara sjónarmiðum í hesum málum, tí hvørja ferð vit vísa á okkara ómissandi rættindi, kann danska stjórnin hinvegin vísa á, at løgtingið hevur samtykt hetta og harvið sagt hesi rættindi frá sær, sigur Høgni Hoydal.

### Kallsberg ósamdur

Anfinn Kallsberg hevur hinvegin drigið eina heilt aðra línu í hesum málinum, og hann fer »varmt at anbefale« hesa lógina.

Hann hevur eina aðra útlegging av argumentinum hjá Høgna Hoydal viðvíkjandi NAMMCO.

– Hetta byrjaði sum ein áhugafelagsskapur, og var ikki ein altjóða avtala at byrja við. Noreg kunngjørdi síðani hendan sáttmálan í ST, tá teir aftur fóru undir at veiða stórhval, sigur Anfinn Kallsberg.

Anders Fogh Rasmussen hevur síðani boðað frá, at hetta er eitt mistak, ið ikki fer at endurtaka seg. So Føroyar skulu ikki gera sær nakrar vónir um at vinna sjálvstøðugan limaskap, eins og vit hava í NAMMCO.

– Hetta hevur altíð verið politikkurin hjá donsku stjórnini mótvegis Føroyum, og í hesum málinum hevur hon ikki verið nóg vakin, ásannar Anfinn Kallsberg, ið annars ikki hevur nakra meining um støðuna hjá tí donsku stjórnini í hesum málinum.

Hann leggur afturat, at fatanin av sambandinum millum Føroyar og Danmark hevur altíð verið ein stríðsspurningur.

– Danir uppfata sambandið okkara millum sum eina delegatión, meðan vit uppfata tað sum ein sáttmála. Vit mugu bara halda fast við, at hetta er ein sáttmáli landanna millum.

Fyrrverandi løgmaður vísir eisini á, at løgtingið als ikki hevur góðkent tær donsku viðmerkingar, men bara tær føroysku, og tað fer hann at halda fast við, hóast forsætismálaráðharrin møguliga sigur nakað annað.

Anfinn Kallsberg finst harðliga at Høgna Hoydal og politikki Tjóðveldisfloksins í øllum hesum málinum.

– Tað harmar meg almikið, at Tjóðveldisflokkurin hevur ført ein kamp við støði í tí donsku útleggingini av málinum. Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt seg til talsmann fyri ta donsku fatanina, og tað er skaðiligt fyri málið sum heild, sigur Anfinn Kallsberg at enda.

---

Yvirtøku- og heimildarlógin:

# Seinasta viðgerð á Fólkatingi

**Tað danska parlamentið fer í dag at viðgera málið um yvirtøku- og heimildarlógina fyri seinastu ferð. Einki broytingaruppskot er á skránni, og tí kemur einki nýtt fram í málinum**

YVIRTØKU- OG HEIMILDARLÓGIN
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Málið um støðuna hjá tí danska málinum í Føroyum var at kalla einasta stríðsmálið undir 2. viðgerð av lógunum, og spurningurin um sjálvstøðuga limaskapin hjá Føroyum og Grønlandi í NAMMCO hevur eisini verið ein av áhugaverdu spurningunum undir viðgerðini.

### Fólkatingið ósamt við Fogh

Málið viðvíkjandi støðuni hjá tí danska málinum í Føroyum gjørdist eitt mál, sum teir donsku fólkatingslimirnir vóru upptiknir av. Og teir vóru ikki allir samdir við tulkingini hjá forsætisráðharranum, Anders Fogh Rasmussen.

Forsætismálaráðið hevur knýtt støðuna hjá tí danska málinum at stjórnarskipanarlógini (statsforfatningen), og tað vóru serfrøðingar, ið vórðu kallaðir til opna hoyring í politiskubúskaparligu nevndini, ikki samdir við ráðnum í.

Nevndin sendi forsætismálaráðharranum fleiri spurningar viðvíkjandi hesi lógini, og ein av hesum spurningum snúði seg um tað danska málið í Føroyum og Grønlandi.

Forsætismálaráðharrin varð biðin um at greiða frá, hvussu hann var komin fram til, at nýtsla av tí danska málinum varð knýtt at stjórarskipanarlógini, og at tað ikki kann yvirtakast av føroyskum myndugleikum.

Soleiðis svarar forsætismálaráðið spurninginum: »Særligt med hensyn til visse sprogforhold har regeringen i lovforslaget lagt den opfattelse til grund, at spørgsmålet om anvendelse af sproget dansk ikke kan overlades til de færøske myndigheder, og at det bl.a. følger af rigsenheden, at borgerne ikke i visse dele af riget kan afskæres fra at anvende sproget dansk i offentlige forhold…«

Forsætismálaráðið heldur fast við, at tað danska málið hevur framíhjárætt í ríkinum, og at allir borgarar til eina og hvørja tíð skulu kunna venda sær til myndugleikarnar á donskum. Tí verður hetta málið knýtt at ríkiseindini, og tað kann tískil ikki yvirtakast av føroyskum ella grønlendskum myndugleikum.

Orðingin viðvíkjandi tí danska málinum í ríkinum stendur annars í viðmerkingunum til lógarupp-skotið.

Viðvíkjandi tí sjálvstøðuga limaskapinum hjá Føroyum og Grønlandi í NAMMCO hevur danska stjórnin gjørt greitt, at hetta er eitt mistak, ið ikki verður endurtikið.

Hetta er eitt mál, ið Høgni Hoydal fleiri ferðir hevur víst til í sambandi við spurningin, hvørt Føroyar hevur rætt at gera millumtjóða avtalur.